# Lítil lundi fleygaður í ár

**- Eg veit ikki, hvat er galið við lundanum í ár, men alt er ikki, sum tað eigur at vera, sigur fleygamaðurin, Kristin Holm, sum hevur verið 14 dagar á fleyg í ár, men ongan dag er komin til 100 lundar**

FUGLAVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*



*Bæði í Nólsoy og Mykinesi lata teir illa at lundanum í ár. - Alt er ikki, sum tað eigur at vera, heldur fleygamaður.*
*Tilvildarlig mynd*

Teir gomlu plagdu at siga, at vikan hvørjumegin ólavsøku er tann besta til lunda. Tað merkir, at dagarnir rundan um ólavsøkuna er besta fleygatíð.

Tá ið fleygatíðin byrjaði fyrst í juli, vóru menn ymiskir á máli um, hvussu vorðið mundi vera við lundanum í ár. Tað lá líkasum í luftini, at lítil fuglur hevði verið at sæð, men onkur helt, at kanska var lundin bara eitt sindur seinni á veg í ár enn vanligt.

Nú lundatíðin er meira enn hálvrunnin, kann staðfestast, at væl minni fuglur hevur verið at fingið í eitt nú Nólsoy enn eitt miðalár. Úr Mykinesi fræddist eisini, at væl minni hevur verið at fingið enn vanligt.

### Ikki komin til 100 lundar

Ein av frægu fleygamonnunum í Nólsoy, Kristin Holm, hevur verið 14 dagar á Urðini, síðan 2. juli, syftunsøkudag, sum er fyrsti fleygadagur hjá nólsoyingum.

Hjá honum plagar ikki at standa á at fleyga 100 lundar, tá ið nøkulunda liggur fyri við byrðinum, men í summar er hann ongan dag komin til 100 lundar.

- Eg havi verið 14 dagar á fleyg og havi fingið tilsamans 800 lundar. Besti dagurin er 90 lundar, sigur Kristin og heldur, at hetta er lítið at tosa um.

Hann dugir ikki at siga, hvat er galið við lundanum í ár, men tað er ikki, sum tað plagar at vera, tá ið summarið er gott.

- Eitt er, at fleygabyrðurin yvirhøvur hevur verið vánaligur, men spurningurin er, um tað er einasta orsøkin til, at so lítið er komið burtur úr.

Kristin vísir á, at teir fyrstu fleygadagarnar lá hann við loti av landnyrðingi; ókyrra var í sjónum - og tá roynist sjáldan nakað serligt. Síðan hevur hann ligið millum útsynning og vestan, og tað er eisini vánaligur fleygabyrður á Urðini.

Sum skilst, eru bara tveir nólsoyingar komnir til 100 lundar í summar; tað eru Rene Hansen og Ivan Holm, og hetta er óvanligt so seint í juli mánaði.

Rene og Ivan høvdu tann eina dagin 150 lundar í part.

### Nógvur sildberi

- Eg veit ikki, hvat er galið, men tað er ikki alt, sum tað eigur at vera, sigur Kristin.

Hann sigur, at sildberi trýtur ikki, og tað er ikki langt ímillum, hann ber pisunum sild. So, líkt er ikki til, at sildberin noyðist langan veg til havs eftir føðini.

- Jú, tað er nógvur sildberi at síggja, men ivaleyst er tað fleygalundin - ella ungfuglurin - sum vantar. Hví so er, er ilt at siga.

Kristin sigur seg hava hoyrt menn tosa um, at nógvur fuglur er at síggja úti á, og tí heldur hann, at tað kortini man vera eitthvørt við føðini, sum ger, at ungfuglur í størri mun ikki kemur at landi.

Við tað, at lítil lundi hevur verið at fingið, hava nólsoyingar heldur ikki verið so ágrýtnir at ganga á fleyg.

- Einir 3-4 mans hava vanliga verið á Urðini hvønn dagin, men týsdagin vóru teir 7 og mikudagin 6 í tali; tá høvdu teir, sum vóru bestir, einar 80 lundar part, sigur Kristin.

### Pisurnar hava tað gott

Fyrr í vikuni var fuglamaðurin, Jens Kjeld Jensen, á Urðini og kannaði nakrar pisur. Sum skilst, bendi alt á, at hesar vóru væl fyri.

- Pisurnar vóru væl í holdum og sóu gott út, sigur Kristin.

Hann heldur tó ikki, at nógvar pisur eru at hoyra, tá ið havt verður í huga, at so nógv útliðið.

- Eg dugi ikki at siga, um fuglurin er seinni lægstur enn vanligt, tí longu, tá ið fleygatíðin byrjaði, bar sildberin sild; so pisurnar eru neyvan heilt seinar í ár, sigur Kristin Holm.

Hann vísir at enda á, at tað er ikki altíð, tað gongur eins á ymisku fuglaplássunum kring landið.

- Í fyrraári var vánaligt við lunda í Skúvoy og á Dímun, samstundis sum hetta árið var eitt tað besta hjá okkum, sigur hann.

# Allur flatfiskurin av landleiðini fer til Onglands

**Safir og Smaragd gjørdu ein góðan túr í vikuni; teir royndu í fýra dagar og fingu 260.000 pund av upsa.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú fleiri virkir eru stongd vegna summarfrí, liggja nógv skip, onnur selja veiðina til tey virkir, sum eru opin, og í triðja lagi fer fiskurin av landinum.

Á Fofish í Saltangará, sigur Leif Høj, at Munkur og Skúgvur í løtuni eru í Hanstholm og selja. Teir høvdu 2100 kassar av upsa, og líkindi vóru til eina hampiliga sølu, tí ídnaðarfrítíðin í Danmark verður ikki liðug fyrr enn mánadagin komandi.

Hann vísir tó á, at vit skulu aftur til mánaðarskiftið juni/juli, tá ið Fofisk sendi seinastu upsaskipini á útlendska marknaðin.

Felagið selir eisini veiðina hjá Sæborg, Sjóborg og Fríðborg, sum fiska á landleiðini.

Leif vísir á, at Sæborg landar á Beta í Saltangará í dag, og Fríðborg og Sjóborg landa hjá Snodd á Toftum.

- Hesin fiskurin fer allur ísaður av landinum, sigur Leif.

Hann sigur, at prísurin á tungu og reyðsprøku hevur verið stabilur og góður. Tungan fer fyri einar 20 og reyðsprøka fyri einar 23-24 krónur fyri kg., og tað er góður prísur.

- Fór hesin fiskurin ikki av landinum, stóð hann eftir á gólvinum, tí eingin arbeiðir tungu og reyðsprøku í Føroyum, sigur Leif.

### Safir og Smaragd høvdu góðan túr

Gorpur og Skrápur landaðu eisini á Beta fyrr í vikuni, og her keypri virkið, Palm Seafood í Vági, allan fiskin, stívliga 200.000 pund.

Safir og Smaragd og Jaspis og Ametyst hava eisini landað í vikuni. Fyrrnevndu høvdu ein góðan túr; teir royndu í fýra dagar og fingu 260.000 pund, sum teir landaðu hjá Snodd á Toftum. Jaspis og Ametyst høvdu 120.000 pund; teir løgdu veiðina upp til Fiskaviking í Saltangará.

Í dag fara Fiskavirking í Saltangará, Vaðhorn á Strondum og Fiskavirkið í Gøtu í summarfrí. Hinvegin letur Fiskavirking í Vestmanna uppaftur eftir ólavsøku og Fiskavirking í Miðvági eina viku seinni.

- Tá ið vikan eftir ólavsøku er farin fram við, vænta vit, at alt fer at stabilisera seg aftur, sigur Leif Høj á Fofish í Saltangará.

# hygg & hoyr

**Frá fríggjadegi 26. juli til hósdagin 1. august**

| Fríggjadagur | Leygardagur | Sunnudagur | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 19.00 Minty og Melanie | 20.00 Undir Krákugjógv | 20.00 Føroyar í dag | 20.30 Vit fara upp á gólv | 10.00 Fuglurin Føniks | 20.00 Gesturin | 20.50 Ally McBeal |
|  |  |  |  |  |  |  |
| 20.50 Stand in for mord | 21.50 Vejen tilbage | 20.00 Con Air | 21.05 The patriot | 19.00 Den perfekte krop | 20.50 Lejemorderens træf | 20.45 Criminal hearts |
|  |  |  |  |  |  |  |

## Fríggjadagur 26. juli

**SVF**

18.30 Likkulikkuleia 22
19.00 Minty og Melanie 3:13
19.25 Gesturin e
20.00 Dagur og Vika
20.20 Íbúðin verður broytt
20.45 Gekkur
21.25 Ferðalagið - svenskur filmur
23.10 Niels Hausgaard 2:2
00.05 Liðugt

**EUROSPORT**

07:30 Cycling: Tour De France
08:30 Football: European Under-19 Championship Norway
09:45 Football: European Under-19 Championship Norway
11:15 Tennis Live: Atp Tournament Kitzbühel Kitzbuhel Austria
12:45 Beach Volley: World Tour France Marseille
13:30 Cycling Live: Tour De France
16:45 News: Eurosportnews Flash
17:00 Football Live: European Under-19 Championship Norway
19:00 Cycling: Tour De France +
19:30 K 1: World Grand Prix Paris Bercy Paris France
20:30 K 1: World Grand Prix Paris Bercy Paris France
21:30 News: Eurosportnews Report
21:45 Cycling: Tour De France
22:45 Football: European Under-19 Championship Norway
23:45 Xtreme Sports: Yoz Mag
00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.00 Freedom's Battle Gdansk - Icebreaker
1.00 TLZ: »Supernatural Science – Physical Feats
2.00 TLZ: »Rough Science
2.30 TLZ: »Talks – Background Brief - Frying OR Freezing
2.45 Ou Bscape Bscape
2.50 TLZ: »Hollywood Science - Die Hard
3.00 TLZ: »Daisyworld
3.25 TLZ: »Pause«
3.30 TLZ: »The Cretaceous Greenhouse – A Surfeit of Carbon Dioxide
3.55 TLZ: »Bites – Science Bites – Virtual Evolution
4.00 TLZ: »Back to the Floor – Cruising
4.40 TLZ: »Landmarks – Ancient Egypt Everyday Lives
5.00 TLZ: »Buongiorno Italia! – Mi Puo Dare Un Numero?
5.30 TLZ: »TLZ: »Starting Business English««
6.00 Smarteenies
6.15 The Story Makers: »Matching
6.30 Salut Serge
6.45 Bodger and Badger: »Water Laugh
7.00 Playdays: »Tent Stop«
7.20 The Really Wild Show
7.45 Garden Invaders: »West Derby
8.15 Real Rooms: »Islamic Kitchen
8.45 The Antiques Inspectors Sherborne
9.15 Ground Force: »Northampton
9.45 Gardeners' World
10.15 The Weakest Link
11.00 Open All Hours
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 All Creatures Great & Small: »Promises to Keep
13.30 Garden Invaders
14.00 Smarteenies
14.15 The Story Makers: »Matching
14.30 Salut Serge
14.45 Bodger and Badger: »Water Laugh
15.00 Playdays: »Tent Stop«
15.20 The Really Wild Show
15.45 Lovejoy: »Poetic Licence
16.45 Attenborough in Paradise
17.45 The Weakest Link
18.30 Liquid News
19.00 Parkinson: »Anne Robinson, Ewan Mcgregor,Nicole Kidman
20.00 Dalziel and Pascoe: »Ruling Passion
21.35 Later with Jools Holland
22.35 Top of the Pops Prime
23.05 Totp Eurochart
23.35 Dr. Who: »Ghost Light«

**BBC WORLD**

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Talking Movies (r)
02:00 BBC News
02:30 Developing World (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Talking Movies (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Developing World (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Talking Movies (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 The Bike's The Star (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 21st Century English
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Correspondent
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**3**

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:15 Tv-Shop
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Once & Again
12:50 Family Law
13:45 Hvileløse Sjæle
15:35 Blossom
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Vild Med Dig
18:00 Med På Moden
18:30 Alle Tiders Barnepige
19:00 Dødsdømt
20:40 Stand-In For Mord
22:50 Sexorama
23:20 Booty Call
00:45 Walker Texas Ranger
01:45 Nash Bridges
02:40 Kodenavn Nikita
03:35 V.I.P.
04:30 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar - Øssur Egholm er vertur
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Garpatáttur (e) - Hans Tórgarð lesur 11. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness, sum Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs hava týtt.
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Máltráðurin - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Í víngarðinum (e) - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Barometrið - Bjarni Mohr, Rúni Jákupsson og Heri Jacobsen skipa fyri.
16.00 Tíðindi
16.03 Barometrið
17.00 Tíðindi
17.05 Vikuskiftið - Suni Merkistein stílar fyri
18.00 Fríggjakvøldstónar - Birgar Johannesen velur løgini
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Villar víddir - Fróði Løkságarð og Eyðun Klakkstein leggja til rættis
20.00 Estudio 2000 - Kári Annand Berg stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:30 Summar á Rás 2 - Hetta er seinnapartstilfar við øllum møguligum tónleiki, tíðindum og samrøðum. Tað verður eingin føst skrá, ið Rásin skal halda, men heldur ein møguleiki hjá øllum møguligum fólkum at koma inn á gólvið at tosa um alt møguligt millum himmal og jørð.
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:25 Tónleikur
01:00 Liðugt

*(Eingin skrá komin)*